umhvørvisstovan

# Taðing við fiskasúrløgu

**Henda vegleiðing fyri taðing við fiskasúrløgu er ætlað bóndum og eigarum av jarðarlendum har taðað verður. Eisini er henda vegleiðing ætlað sum eitt amboð hjá kommunum at brúka í teirra eftirliti við landbúnaðinum.**

## Fiskasúrløga kann nýtast til taðing

Sambært kunngerð um burturkast[1] er ikki loyvt at tveita ella lata burturkast, harundir fiskasúrløgu, liggja og rekast í haga, fjøru, á sjógvi, framvið vegi ella aðrastaðni. Í hesum føri er talan um at gera nýtslu burturúr fiskasúrløguni við at nýta tað til taðing. Umhvørvisstovan er av tí fatan, at verður hetta gjørt á ein skipaðan hátt, kann hetta ikki roknast sum burturbeining.

## Má tó ikki dálka ella vera til ampa

Tað er umráðandi, at taðing við fiskasúrløgu verður framd soleiðis, at tað ikki elvir til dálking ella er til ampa fyri fólk, ið búgva nærhendis, hvørki hvat viðvíkir frárenning í áir, løkir, vøtn o.t, lukt, taðsprutt, rottu, fugli ella nógva flugu. Sí eisini ásetingar í kunngerðini um umhvørvisreglur[2].

## Kommunan er eftirlitsmyndugleiki

Bý- og bygdarráð hevur eftirlit við, at taðing ikki elvir til dálking ella ampar, og kunnu seta tiltøk og avmarkingar í verk fyri at fyribyrgja hesum. Ber ikki til at fáa bøtt um amparnar, kann bý- ella bygdarráð seta forboð fyri virkseminum.

## Rætningslinjur

Fyri at fáa eina væl skipaða taðing við fiskasúrløgu verður mælt til fylgjandi rætningslinjur:

**1.** Fiskassúrløgan skal malast væl og blandast við mykjutøð í minsta lagi í lutfallinum 1:4 áðrenn taðað verður.

**2.** Mælt verður til, at sprænt verður í mesta lagi 15-20 tons av fiskasúrløgu pr. hektar um árið.

**3.** Mælt verður til, at taðað verður bert í gróðrartíðini, ið er frá 15. mai til 1. august. Tó kunnu tøð veltast í jørðina í tíðarskeiðnum 1. apríl til 1. oktober.

**4.** Fyri at fyribyrgja at tøðini seta í áir, løkir, vøtn v.m. verður mælt frá at taða, tá nógv regn (áarføri) er, tá lendi er fryst ella tá kavi liggur.

---

1 Kunngerð nr. 147 um burturkast frá 19. oktober 1995, sum broytt við kunngerð nr.90 frá 28. september 2007
2 Kunngerð nr. 53 um umhvørvisreglur frá 3. mai 1994, sum broytt við kunngerð nr. 111 frá 7. september 2009



**Umhvørvisstovan** · Traðagøta 38 · Postboks 2048 · FO-165 Argir · Føroyar · Tel +298 34 24 00 · Faks +298 34 24 01 · us@us.fo · www.us.fo

**5.** Tað eigur ikki at verða taðað uttangarðs og í haga.

**6.** Tað er bannað at taða á vatnveitingarlendum. Hetta merkir, at taðfall ikki má koma í áir, løkir, keldur ella vøtn, ið verða nýtt til drekkivatn. Mælt verður frá at taða nærri enn 50 metrar frá vatnveitingarlendum og vatnbrunnum.

**7.** Mælt verður frá at taða nærri enn 50 m frá sethúsum o.l. í bý- ella bygdaøkjum. Her skulu atlit eisini takast til ampar av lukti, taðsprutti o.ø.

**8.** Er talan um alifisk, skal fiskasúrløgan trykksóttreinsast, áðrenn hon verður nýtt til taðing.

Fyrstu ferð útgivin: 12.03.1997
Seintast dagført: 09.07.2010
Útgava nr.: 3



**Umhvørvisstovan** · Traðagøta 38 · Postboks 2048 · FO-165 Argir · Føroyar · Tel +298 34 24 00 · Faks +298 34 24 01 · us@us.fo · www.us.fo